# eftir olju í Brasil



*Ragnar Poulsen á strondini í Botafogo, tætt við skrivstovuna hjá StatoilHydro*



*Ragnar saman við konuni Marilene, sum skal eiga í september, og soninum Thomas á staðnum Corcovado. Í bakgrundini er Alto Leblon, har tey búgva*



*Ragnar og sonurin á strondini*

hann er og hyggur eftir onkrum dysti av og á?

- Ja, vit hava verið á kenda Maracana vøllinum! Tá eg flutti higar hevði bilførarin, sum koyrir meg og familjuna, eina serliga gávu við á flogvøllinum. Hann gav mær beinan vegin eina troyggju hjá kenda fótbóltsfelagnum Flamenco, tí hann vildi vera vísur i, at eg ikki for at halda við skeivum felagi ...Jú, fótbóltinum brenna tey øll fyri, og allastaðni síggjast børn og vaksin spæla bólt frá tíðliga á morgni til langt eftir sólsetur, sigur hann.

Hugsi við mær sjálvum, at so er alt sum tað eigur at vera ...!

Í eygunum hjá flestu føroyingum er Brasil eitt sera fjarskotið og spennandi land, har er heitt, vøkur náttúra, karneval og nógvar baðistrendur. Eg komi at hugsa um, um Ragnar man hava góða tíð til at liggja á strondini, dansa samba ella ganga til bossanova konsertir.

- Ja, í vikuskiftunum eru vit sum oftast ein dag á strondini, tað er har fólk møtast at spenna úr og hugna sær. Vit hava verið til fleiri konsertir, og bilførarin hjá okkum, ið er sera íðin sambadansari og limur í einum av teimum tiltiknu sambaskúlunum, hevur bjóðað okkum við. So man tað ikki fara at eydnast at læra eitt dansifet ella tvey...? Tríggjar ferðir um vikuna læra vit so eisini portugisiskt fyri. At tosa málið er ein týðndi táttur til tess at koma undir húðina á fólkinum og mentanini, greiðir Ragnar frá.

## Ránsmenn, narkotika og morð

Men vit vita jú, at har er eisini hin síðan. Har er nógv fátækradømi og kriminalitetur. So eg spyrji Ragnar, um hann merkir nógv til tað.

- Fátækradømið er sjónskt, mong heimleys gøtubørn síggjast á gøtunum, og manga staðni í býnum síggjast Favela'ir, tað vil siga fátækrabýlingar, ið eru bygdir á brøttu fjallasíðunum.

- Statistiskt sæð er Rio ein av heimsins mest vandamiklu býum at liva í. Í meðal verða 17 fólk myrd um dagin, men flestu drápini eru i samband við narkotikavirksemi, og hóast flestu fólkini í Favela'unum eru lóglýdnir borgarar, eru flestu morðini við Favela'irnar. Dagliga merkir tú ikki nógv til henda kriminalitetin, og vit kenna okkum trygg á flestu gøtunum mitt í býnum. Vandin fyri at blíva rændur er tó altíð til staðar, og fleiri sum eg kenni hava verið úti fyri hesum. Men um tú verður offur fyri ráni, so er tað sum oftast bert pening, ránsmennirnir eru úti eftir. Og um tú gert sum tú verður biðin, so sleppur tú aloftast frá tí óskalaður, sigur Ragnar.

## Við skottryggum bili og privatførara

Ragnar og familja hansara ferðast ikki sjálv í egnum bili, men verða flutt aftur og fram í leigaðum bili við bilførara. Trygdin verður sett í hásæti, og tað er einki minni enn við einum skottryggjaðum jeepi. Eg spyrji Ragnar, um hann kann greiða eitt sindur nærri frá hesum.

- Flestu oljufelog hava sera strangar HSE reglur (HSE stendur fyri heilsa, trygd, og umhvørvi, blaðm.) fyri at byrgja upp fyri burturflytingum og ráni av bilum og fólki. Til tess at fyribyrgja hesum verður sum oftast ferðast í skottryggum og armeraðum bilum við serliga vandum bilførarum. Til alla lukku er tað sera sjálsamt, at fólk verða burturflutt í Rio, men tað hendir meira týðum í Sao Paulo (størsti býur í Brasil, blaðm.). Ein fyrimunur við at hava serliga vandar bilførarar og armeraðar bilar er eisini, at tú kennir teg meiri tryggan í ferðsluni. Ferðsluvanlukkur eru hóast alt ein størri hóttan enn rán og burturflytingar. Ein annar fyrimunur er eisini, at bilførararnir kenna býin væl og ferðsluna við, og teir duga væl at flyta teg skjótt og trygt frá einum staði til annað, sigur Ragnar Poulsen at enda.

> *Ferðsluvanlukkur eru ein størri hóttan enn rán og burturflytingar*

> *Statistiskt sæð er Rio ein av heimsins mest vandamiklu býum at liva í*

> *Í meðal verða 17 fólk myrd um dagin, men flestu drápini eru í samband við narkotikavirksemi*